TÍÐINDI

Samgongan misti meirilutan

Javnaðarflokkurin og Tjóðveldi vinna 8,4 prosentstig fram í nýggjari veljarakanning, sum vísir, at samgongan missir tríggjar tingessir

Eirikur Lindenskov



Kanska tann Johannesen, sum tapir letur tí Johannesen, sum vinnur, skipa nýtt landsstýrið...?

Hevði løgtingsval verið nú, so hevði samgongan mist meirilutan.

Tað vísir nýggjasta veljarakanningini hjá Gallup Føroyar, sum Dimmalætting kunngjørdi mánadagin.

Í hesi kanning kunnu stóru samgonguflokkarnir notera sær eina rímuliga stóra afturgongd, Sambandsflokkurin gongur 3,0 prosentstig aftur, meðan Fólkaflokkurin gongur 3,2 prosentstig aftur. Sjálvstýrisflokkurin fær so lítla undirtøku, at hann vinnur ikki upp um tinggáttina, meðan einasti samgonguflokkur, sum gongur fram, er Miðflokkurin, sum gongur 0,6 prosentstig fram.

Hetta er fimta veljarakanningin, sum er kunngjørd síðani valið 29. oktober í 2011. Hetta er onnur veljarakanningin, sum vísir, at samgongan hevði mist meirilutan. Hin var tann, sum kunngjørd varð í juli. Felags fyri allar veljarakanningarnar er, at samgongan gongur aftur. Sambandsflokkurin gekk eitt fær lakasta úrslitið í hesari kanningini, sum Dimmalætting kunngjørdi mánadagin, 21,7 prosent.

Størstu framgongdina í veljarakanningini hevur Javnaðarflokkurin, 4,7 prosentstig. Tjóðveldi gongur 3,7 prosentstig fram, meðan Framsókn gongur 1,1 prosentstig aftur.

Hetta merkir, at Sambandsflokkurin, Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin missa ein tingsess í part, meðan Javnaðarflokkurin fær tveir tingsessir afturat og Tjóðveldi ein.

Hóast samgongan varðveitir meirilutan av veljarunum, 50,5 prosent, so missir samgongan meirilutan í løgtinginum. Hetta er tí, at Sjálvstýrisflokkurin við sínum 2,6 prosentum av veljarunum ikki fær umboð valt á ting, og tí fara atkvøðurnar fyri skeytið.

Tað er mandatbýtið í løgtinginum, sum telur, og tað vísir 16 tingsessir til samgonguna og 17 til andstøðuna.

eirikur@sosialurin.fo

Lutfall samgonga/andstøða

		SAMGONGA	ANDSTØÐA	SESSIR SAM.	SESSIR AND.
Løgtingsvalið okt 2011	*29-10-2011*	57,8	42,2	19	14
Gallup desember 2011	*30-11-2011*	52,6	47,4	17	16
Gallup februar 2012	*21-02-2012*	51,6	48,4	17	16
Gallup juli 2012	*03-07-2012*	48,0	52,0	15	18
Gallup november 2012	*09-11-2012*	51,6	48,4	17	16
Gallup februar 2013	*25-02-2013*	50,5	49,5	16	17
Mundur valið/í dag		***-7,3***	***7,3***		

Úrslit

Fólkaflokkurin	19,3
Sambandsflokkurin	21,7
Javnaðarflokkurin	22,5
Sjálvstýrisflokkurin	2,6
Tjóðveldi	22,0
Miðflokkurin	6,9
Framsókn	5,1

Sperrumark:
1/33 av atkvøðunum

Tingsessir

	KANNING FEBRUAR 2013	LØGTINGSVALIÐ 29. OKTOBER 2011
Fólkaflokkurin	7	8
Sambandsflokkurin	7	8
Javnaðarflokkurin	8	6
Sjálvstýrisflokkurin	0	1
Tjóðveldi	7	6
Miðflokkurin	2	2
Framsókn	2	2

		FÓLKAFLOKKURIN	SAMBANDSFLOKKURIN	JAVNAÐARFLOKKURIN	SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN	TJÓÐVELDISFLOKKURIN	MIÐFLOKKURIN	FRAMSÓKN	FÓLKAFLOKKURIN	SAMBANDSFLOKKURIN	JAVNAÐARFLOKKURIN	SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN	TJÓÐVELDISFLOKKURIN	MIÐFLOKKURIN	FRAMSÓKN	SAMGONGAN TILS.	ANDSTØÐAN TIL S.
Løgtingsvalið okt 2011	*29-10-2011*	22,5	24,7	17,8	4,2	18,3	6,3	6,2	8	8	6	1	6	2	2	19	14
Gallup desember 2011	*30-11-2011*	19,2	24,9	20,2	2,7	18,9	5,9	8,4	7	8	7	0	6	2	3	17	16
Gallup februar 2012	*21-02-2012*	19,0	24,4	20,2	3,3	20,8	4,9	7,4	6	8	7	1	7	2	2	17	16
Gallup juli 2012	*03-07-2012*	15,7	22,2	23,1	2,9	22,1	7,2	6,8	5	8	8	0	8	2	2	15	18
Gallup november 2012	*09-11-2012*	19,6	23,5	20,8	2,7	21,8	5,8	5,9	7	8	7	0	7	2	2	17	16
Gallup februar 2013	*25-02-2013*	19,3	21,7	22,5	2,6	22,0	6,9	5,1	7	7	8	0	7	2	2	16	17
Undirøtka í mun til valið		***-3,2***	***-3,0***	***4,7***	***-1,6***	***3,7***	***0,6***	***-1,1***									